

*Dyrnar til nýggja frískúlan lata væntandi upp næsta skúlaár. Í fyrsta umfari verða tað tær báðar, Sharon Weiss og Eyðbjørg Dalsgaard, sum undirvísa í og reka skúlan*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Tveir árgangir saman

Eitt annað, sum er øðrvísi við frískúlanum er, at flokkarnir verða settir saman av tveimum árgangum í hvørjum.

- Vit meta, at tað er ein fyrimunur fyri allar næmingarnar at seta flokkarnar saman, so tað altíð eru nøkur børn, sum eru nýggj og óroynd, og so nakrir veteranar. Næsta skúlaárið fara tey eldri eitt stig upp og gerast yngst í flokkinum yvir og so framvegis. Fyrimunurin við hesum er, at allir næmingar læra at taka ímóti og leggja lag á hjá teimum yngru og at fáa tey at kenna seg væl. Soleiðis geva vit teimum ein part av ábyrgdini, eisini fyri tí fakliga, tí ein sannroynd er tað, at tann sum lærir mest er tann, sum lærir frá sær, sigur Eyðbjørg. Og hon vísir á, at tey vóna, at sum frá líður, fara tey at seta ein pedagog í starv eisini.

- Í hesum sambandi hava vit sett okkum í samband við læraraskúlan, har vit ætla at samstarva um at fáa næmingar í starvsvenjing hjá okkum, bæði pedagoglesandi og læraralesandi, sigur hon.

### Virkin foreldrabólkur

Krøvini til foreldur, sum senda børnini í frískúlan, eru nakað størri enn vit kenna úr fólkaskúlanum, men afturfyri fáa tey eisini meira innlit í skúlan sum heild. Sambært lógini skal frískúlin vera ein sjálvsognarstovnur, har øll foreldrini, umframt aðrir vinir skúlans, eru limir í einum áhugabólki.

- Ætlanin er at hvørt foreldrapar kemur til foreldrasamrøðu í ein tíma í byrjanini av skúlaárinum og so aftur ein tíma um várið. Harumframt verða kunningarskriv send heim hvørja viku og nógv tiltøk eru í skúlanum fyri foreldur og børn, sigur Eyðbjørg.

### Øll kunnu vera við

- Vit ynskja, at samansetingin av næmingum skal endurspegla samfelagið. Sjálvsagt verður eitt egingjald, men tað fer eisini bera til at fáa heilt ella partvíst fríplláss, um ráðini ikki eru so góð. Harumframt fáa børn við serligum tørvi vanligu stuðulstímarnar frá landinum við inn í skúlan, eins og í fólkaskúlanum, siga tær báðar at enda. Til ber at lesa meira um frískúlan á *www.friskulin.or*

